

Ben Arabo tá Atlantic Petroelum bleiv skrásett á keypsskálanum í Oslo tann 12. desember 2013. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum avdúkar úrslitini í morgin

**Jógvan Hugo Gardar**

28.08.2014 - 16:13

Oljan.fo

Klokkan átta fríggjamorgunin almannakunngerð Atlantic Petroeleum roknskaparúrslitini fyri fyrra hálvár í 2014.

Hetta er samstundis fyrsta høvi hjá fyritøkuni at meta um hvussu tað hevur hilnast at vera skrásett á keypsskálanum í Oslo. Atlantic Petroeleum var frammanundan skrásett í Reykjavík og í Keypmannahavn, men valdi á heysti 2013 at strika fyritøkuna á íslendska keypsskálanum, og heldur skráseta seg í Oslo, har fleiri aðrar oljufyritøkur eru skrásettar.

Í samband við at úrslitini verða løgd fram í morgin, skal ben Arabo, stjóri, hava eina framløgu á Hotel Continental í Oslo. Hetta er sama hotell sum millum annað tær flestu alifyritøkurnar leggja fram síni rokniskapartøl.

Hetta er samstundis fyrstu ferð at tær báðar føroysku fyritøkurnar á Oslo Børs, Atlantic Petroleum og Bakkafrost, leggja fram roknskapartølini somu viku í norska høvuðsstaðnum.